Skemt

Lagt til rættis:Jákup Mørk

# Í rangastrúpan

**Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini vøi teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.**

## Bara lúsin er útlendsk

»Vit hava ikki serfrøðingar í samband við oljudálking í Føroyum, og mugu tí heinta hjálp til hesar dálkingar uttanlands«

*Útvarp Føroya*

## Vit bera yvir

»og bera vit lesaran bera yvir við okkum«

*Dimmalætting*

## Blaðdeyðin

»Blíðskapurin var stórur, tá Sosialurin legði beinini framvið (stað) í morgun«

*Sosialurin*

## Hvar svimja tey so?

»Vegna svimjikapping er svimjihøllin stongd«

*Kunngerð í Útvarpinum*

## Tíðin rennur avstað

»Málmbólkurin SIC varð settur á stovn í februar 2006. Og nú trý ár seinni…«

*Dimmalætting*

## Óførur skipari

»Hetta er maðurin sum síðani 1993 hevur siglt okkara oyggjar aftur og fram við vøkru sluppini Norðlýsinum«

*Sosialurin*

## Hasin fer at lukta

»Og ein feitan hvítleik«

*Uppskrift í SMS-blaðnum*

## Tað var ikki nógv

»Tað hjálpir so óbetýðiliga nógv«

*Útvarp Føroya*

## Orðaspæl

Um tú hevur gjørt eina yrking. Kanst tú so biðja eitt nótavirki gera lag til hesa?

Er tað ein musikalsk avbjóðing at sigla við einum nótaskipi?

# Bankabrillur



Í Noreg vilja koyrilærarar ikki síggja nýggja brillumótan, sum í ávísum førum sigst vera lívshættisligur. Trupulleikin er, at brillurnar geva sonevnt tunnilssýn, har fólk ikki sansa teir vandar, sum kunnu koma aðrastaðni frá. Men kanska er tað júst hesin eginleikin, sum ger, at føroysku bankastórarnir veruliga hava tikið nýggja mótan til sín. Heimasíðan nym.fo hevur gjørt vart við nýggja bankamótan, og her gera vit so okkara egnu kollektión.

**-mørk**

# Altjóðagerð

Ofta hevur navnið hjá okkum á Sosialinum verið misfatað. Ikki minst, tá útlendingar skulu gita seg fram til, hvat navnið man merkja. Soleiðis var eisini hjá ferðamanninum, ið enntá fekk myndina við í teigin fyri "læsernes egne billeder" í Jyllands-Posten. Spurningurin hjá myndatakaranum er, hvørt talan er um eitt nýtt slag av almennum pisshúsi her í Vágsbotn




Sosialurin